# Á HVONN LIVE





*Lena og Niclas framførdu tvey løg, millum annað eina tulking av andaliga sanginum: when the saints go marching in.*



*Óluva á Lofti í Sirri, sum bara selur føroysk merki, heldur, at tað, føroyskir sniðgevar gera, líkist frá útlendsku vørunum. - Føroyskur móti stendur seg minst líka væl sum tann útlendski, og føroyingar keypa alsamt meiri føroyskar vørur.*



*Beinta Poulsen sniðgevi, sum hevur merkið Soul Made, var og greiddi frá um at arbeiða við móta, um trýstið av at gera nýggjar kollektiónir hálva hvørt ár, og um hvussu torført tað er at koma fram sum sniðgevi.*



*Oliver Bjerrehus, sum hevur livað av útsjóndini síðani hann var heilt ungur, greiddi frá um modelheimin. Hann heldur, at tað als ikki er sama kapping millum manniligu modellirnar, sum tað er hjá kvinnunum*



*Eisini føroyska unnustan hjá Oliver Bjerrehus, Gunvør Virgarsdóttir, var við á Hvonn. Hann lat ongan iva vera um, at hon er vakrasta kvinnan, hann nakrantíð hevur sæð. Tá hann fyrstu ferð sá hana í Netto, visti hann, at hon var kvinnan í hansara lívið. Hon greiddi frá, at tað kann evra markbrótandi at liva saman við einum manni, sum so nógvar kvinnur vilja hava.*